# Reglugerð fyri stuðul til Vinnuferðavinnutiltøk í Tórshavnar kommunu

**§ 1.** Kommunan kann veita stuðul til altjóða Vinnuferðavinnutiltøk.
*Stk. 2.* Stuðulin kann latast sum ein móttøka og/ella stuðul til sjálvt vinnuferðavinnutiltakið.
*Stk. 3.* Umsóknir um stuðul skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 3 mánaðir, áðrenn tiltakið byrjar.
*Stk. 4.* Umsóknin verður send til: VFV@torshavn.fo.

**§2.** Krøv til tiltakið:
1) Stuðul verður latin til tiltøk, sum verða hildin uttan fyri háárstíð (Háárstíð verður her sett til 15. mai – 15. august).
2) Kommunan letur stuðul til tiltøk við í minsta lagi 50 luttakarum, harav minst 50% eru útlendingar.
3) Umsøkjarin skal lýsa, hvat tiltakið snýr seg um.
4) Fyriskiparin skal verða sinnaður at skipa fyri almennum uppleggi/tiltaki, sum kemur borgaranum til góðar (ókeypis) møguliga í samstarvi við til dømis Visit Faroe Islands, Visit Tórshavn og/ella onnur.
5) Umsóknin skal lýsa eitt møguligt tiltak/fyrilestur osfr.
6) Um søkt verður um annan stuðul, skal fíggjarætlan fylgja við, har upplýst eisini er um, hvussu tiltakið annars verður fíggjað.
7) Umsøkjarin fyllir út eftirmetingarskjal í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at tiltakið er liðugt, og sendir tað aftur til: VFV@torshavn.fo. Visit Faroe Islands, Visit Tórshavn og Tórshavnar Kommuna tilskila sær rætt til at nýta upplýsingar á eftirmetingarskjali til marknaðarføringarendamál.
*Stk. 2.* Undantøk kunnu gerast frá stk. 1, pkt. 1 og 2, um vinnuferðavinnan er serliga áhugaverd í mun til ferðavinnu, vitan, ella hevur eina ávísa støðd.

**Móttøkur**
**§ 3.** Kommunan hevur tveir ymiskar pakkar at bjóða í sambandi við móttøkur.
*Stk. 2.* Kommunan tekur avgerð um, hvør pakki hóskar best til tiltakið.
*Stk. 3.* Dømi um pakkar:
1) Kaffi, te, vatn og sjokuláta.
2) Øl, cider, vatn og føroyskur viðskeri.
**§ 4.** Móttøkurnar verða sum oftast hildnar í hølum hjá kommununi.
*Stk. 2.* Borgarstjórin er vertur.
**§ 5.** Móttøkan skal vera burðardygg soleiðis at skilja, at rávørurnar helst skulu vera føroyskar og framleiddar í Føroyum. Vistveiting skal somuleiðis vera føroysk.
*Stk. 2.* Atlit skal takast at umhvørvinum. Víst verður til umhvørvispolitikkin hjá Tórshavnar kommunu.

**Annar stuðul**
**§ 6.** Kommunan kann veita stuðul til sjálvt tiltakið, um talan er um:
1) Alment tiltak í sambandi við vinnuferðavinnutiltak.
2) At annað verður gjørt burturúr, sum ger eitt tiltak serliga áhugavert fyri býin, vitanarspjaðing ella ferðavinnuna.

3) Onnur almannagagnlig endamál í kommununi.
*Stk. 2.* Undantak kann gerast frá stk. 1, um søkt ikki verður um stuðul til móttøku.
*Stk. 3.* Stuðulin kann í mesta lagi verða upp í kr. 100 pr. luttakara.

**Umsiting**
**§ 7.** Býráðsskrivstovan tekur støðu til umsóknir um at stuðla við móttøku og/ella øðrum stuðli. Hetta verður samskipað við tey starvsfólk, sum arbeiða við vinnuferðavinnu í Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn.
**§ 8.** Umsóknir um annan stuðul, sum er omanfyri kr. 15.000, skulu leggjast fyri Vinnunevndina. Vinnunevndin verður regluliga kunnað um umsitingina av stuðlinum.

**Gildiskoma**
**§9.** Reglugerðin verður sett í gildi, tá hon er samtykt í býráðnum.